Vikuskiftis Sosialurin



†

## Andlát og jarðarferðir

**Sofie Helene Jordan**, vanliga nevnd Didda, ættað úr Tórshavn, andaðist í Frankaríki mikudagin, 89 ára gomul.

**Olga Jensen á Sandi** andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin, 90 ára gomul. Kistan fer úr Landssjúkrahúskappelinum fríggjadagin klokkan 14. Jarðarferðin verður leygardagin klokkan 14 úr Sands kirkju. Sungið verður úr sálmabókini.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá ið mamma, vermamma, omma, langomma, systir og svigarinna okkara

**Hanna í Selvindi**
Stendur

andaðist og varð jarðað.
Tøkk øll tit, familja og vinir, sum vóru so væl um mammu okkara, og so trúføst vitjaðu inn á gólvið.
Tøkk til heimasjúkrasystrarnar, heimahjálpirnar, hvíldarheimið Naina, starvsfólkini á B7 og G3, sum tóku sær so væl av henni.
Tøkk til tykkum, sum talaðu og fyri vakran sang, og tøkk til berarar, sangarar og tykkum, sum fylgdu henni til gravar.
Takk fyri heilsanir, blómur, kransar og peningagávur til nýggja Missiónshúsið á Strondum.
Tøkk, øll somul, fyri umsorgan og kærleika tykkara móti okkum í hesi sváru tíð.

Gleðiligar páskir.

*Familjunnar vegna*
**Ásbjørg og Alith**



**Prógv**
Jógvan Jacobsen í Hoyvík varð 14. februar 2008 avlærdur sum bakari hjá bakarínum GRÓN í Havn.
Lærumeistari var Eli Andreasen

# Oddvá Nattestad 60 ár

Í dag, fríggjadagin 14. mars, verður Oddvá Nattestad í Havn 60 ár. Hon er dagligur leiðari í sjónleikarahúsinum í Havn.



Oddvá er ættað úr Syðrugøtu. Foreldrini vóru Hanna og Leon Joensen. Hon var úr Syðrugøtu, og hann var úr Froðba. Tey fingu fimm børn: Jórun, Líggjas, Jógvan Salemon, Oddvá og Helgi. Jórun býr á Argjum, Líggjas og Oddvá í Havn, Jógvan Salemon í Syðrugøtu og Helgi í London.

Oddvá fór á læraraskúla í 1966, og har gekk hon í flokki eitt nú saman við Niels Nattestad, sum hon giftist við. Í fyrstu atløgu las Oddvá í tvey ár. So varð hon mamma tvær ferðir og vikarur í Adventistaskúlanum í tvey ár. Í 1976 leyk hon læraraprógv, og hon hevur verið lærari í Eysturskúlanum 1976-81, í Hoyvíkar skúla 1989-2000 og í Kaldbak 2006-2007.

Tá ið hon fyri tveimum árum síðani í bláa stólinum her í blaðnum varð biðin at lýsa seg sjálva við trimum orðum, svaraði Oddvá impulsiv, spent og forvitin. Hetta eru eginleikar, sum hon hevur havt ágóða av í samskipandi arbeiðunum, sum hon hevur havt innan mentanarlívið. Hon gjørdi barnaútvarp 1981-87, og hon arbeiddi á Kunningarstovuni hjá Tórshavnar býráð 1987-89.

Oddvá var samskipari av Listastevnuni, sum var í Norðurlandahúsinum 2000-2006, og síðani 2007 hevur hon verið dagligur leiðari í sjónleikarahúsinum. Áhugin fyri sjónleiki stavar heilt frá ungum av. Oddvá hevði staðið á palli í Gøtu, áðrenn hon kom til Havnar. Hon hevur verið við í fleiri leikum í sjónleikarahúsinum, nevndarlimur og formaður í Havnar Sjónleikarafelag og nevndarlimur í Meginfelag Áhugaleikara Føroya MÁF. Harafturat hevur hon eitt nú verið nevndarlimur í Nordisk Amatørteaterråd NAR, og 1981-84 var hon í barna bókaheiðurslønarnevndini hjá Tórshavnar býráði.

Oddvá dámar væl at ferðast, og hon hevur nógv sambond uttanfyri landoddarnar. Eitt nú lærdi hon nógvar útlendingar at kenna, tá ið hon var leiðari av listastevnuni.

Oddvá er gift Niels Nattestad. Tey eiga trý børn – Finnbjørg (1968), Beinta (1969) og Ásbjørn (1979). Tær báðar búgva í høvuðsstaðnum, og Ásbjørn býr í Keypmannahavn. Ommubørnin eru níggju í tali.

J

# Maja í Túni 90 ár



Mánadagin 17. mars verður Maren Elisabeth ella Maja í Túni 90 ár. Maja er ættað úr Havnini, men størsta partin av lívinum hevur Maja búð áToftum.

Maja er dóttir Jóhonnu og Jens Christian Guttesen á Tinghúsvegnum í Havn. Hon var ættað úr Skálavík, og hann var havnarmaður. Maja og tey vóru ellivu systkin: Jens, Maja, Óli Jógvan, Gunhild, Kirsten, Petur, Leivur, Brynhild, Erling, Ingrid og Gunnar.

Jens, Óli Jógvan, Gunhild, Leivur, Ingrid og Gunnar eru farin. Kirsten, Petur og Brynhild búgva í Havn, Erling býr í Glostrup, og Maja býr á Toftum.

Maja giftist 9. januar í 1943 við Júst í Túni á Toftum, har tey búsettust. Júst, ið var kendur skipari og vinnuligur undangongumaður, doyði 5. august í 1995. Á heysti í 1987 fluttu tey bæði til Havnar at búgva í íbúð í kjallaranum hjá elstu dóttrini, og har búði Maja í 17 ár. Síðani sambýlið Vesturskin á Toftum kom fyri góðum trimum árum síðani, hevur Maja búð har, og har kennir hon seg væl millum góð starvsfólk og fryntlig búfólk. Hon hevur altíð verið góð við og hildið nógv av toftafólki, og har inni fær hon altíð gott skoðsmál. Ikki minst frá fleiri ættarliðum av toftabørnum, sum so mangan spældu í túninum hjá henni.

Maja og Júst eiga átta børn: Andrias, Alma, Hanna, Kristian, Petur, Sanna, Símin og Marjun. Alma og Hanna búgva í Havn, og hini búgva á Toftum. Júst var hittinorðaður, og onkuntíð tók hann til, at tað var ótrúligt, at so nógv skuldi spyrjast burturúr einum túri niðan eftir Sanatoriuvegnum saman við einari fittari havnargentu: Maja eigur átta børn, átta svigerbørn, 29 barnabørn og higartil eru 22 langommubørn komin.

Sum ung genta arbeiddi Maja á apotekinum, og so tænti hon m. a. hjá Heinesen og Christiani Holm. Eftir at hon var gift, var hon heimaarbeiðandi, og tað var nóg mikið at takast við. Børnini vóru tøtt, og heimið var eyðkent av stórum gestablídni og nógvum vitjanum.

Tá ið øll børnini vóru undankomin, var Maja á Nyki í nøkur ár, og har dámdi henni væl at vera saman við øðrum toftakonum.

Guttesen fólkini duga væl at syngja og spæla uppá. Øll systkini hava í síni tíð sungið í sangkórinum í Ebenezer, og eftir at hon var komin til Toftir, var Maja hollur sangstuðul í salinum, har hennara andaliga heim var, og har hon altíð møtti, tá ið nakað var á skránni.

Eitt stórt ár eftir at Maja og Júst vóru flutt til Havnar at búgva, fekk hon eitt strik, sum hevði við sær, at hon gjørdist lamin í aðrari síðuni. Hóast tað síðani ikki hevur verið so lætt at ferðast og vitjað, sum tað var frammanundan, so hevur Maja verið við, tá ið familjan er komin saman, og inntil fyri fáum árum síðani var hon á hvørjum sumri á bíbliuskeiði í Zarepta.

90 ára føðingardagin heldur Maja saman við sínum næstu.

J